**Brot úr galdandi byggisamtykt hjá Tvøroyrar Kommunu:**

**§ 20: Øki A: Miðstaðarøki**

1) Økið verður lagt av til miðstaðarbygging, t.e. bústaðir, handlar, skrivstovur, samkomuhøli, heilsubótarstovur, gistingarhús, matstovur, smærri handverksfyritøkur o.t. Byggimyndugleikin kann geva loyvi til at innrætta eina íbúð til virkiseigara ella starvsfólk.

2) Byggistigið má ikki fara upp um 0,6.

3) Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 1,0. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$ ella minni fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$, verður nettonýtslustigið fastlagt í mun til víddina á grundstykkinum soleiðis, at nettonýtslustigið er 1,5 fyri grundstykki til víddar 200 m2 minkandi lutfalsliga til 1,0 fyri grundstykki upp til vídd 500 m2.

4) Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 3 hæddum við nýttum lofti og ikki vera hægri enn 10 m til yvirgrindina og 13 m til mønuna mált frá meðaljørðildi (meðal við húsahornini). Kjallari verður roknaður sum húsahædd um so er, at loftið er meira enn 1,0 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.

5) Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í stk. 2, 3 og 4 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó kann nettonýtslustigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 2,0.

**§ 32: Øki F: Almenn frítíðarøki**

1) Økið verður lagt av til ítróttarvøllir, spælipláss, útiverupláss o.a.t.

2) Innan fyri økini mugu bert verða gjørdir bygningar, sum samsvara við endamálið hjá avvarandi økispørtum og tí tænastuvirksemi, ið hevur samband við teir.

3) Bygningar kunnu bert verða bygdir eftir byggiætlan, sum býráðið hevur góðkent fyri eitt natúrliga avmarkað øki.

4) Planting av runnum og trævøkstri kann bert fara fram eftir góðkendari plantingarætlan.

Sí annars heimasíðuna hjá Tvøroyrar Kommunu: www.tvk.fo